Bowling er komi› fyri at ver›a

- Um eg ikki rokna›i vi›, at hetta bar til, so var eg als ikki farin undir arbei›i›, sigur Bjarni Kyster



Bjarni Kyster, sum er høvu›sma›urin aftan fyri n‡ggju bowling-høllina, er sannførdur um, at n‡ggja ítróttin fer at fáa fastatøkur her á landi

ÍTRÓTTAGREIN
Or›: Jákup Mørk
Myndir: Álvur Haraldsen

Fert tú í dag ni›an á Háls í Havn, har Thomas Dam hevur bygning sín, er ta› anna› enn patrónir, slikk og hvítivørur, sum eru at síggja.

Uttan ífrá er bygningurin kanska ikki broyttur ta› heilt stóra. Okkurt n‡tt er asfaltera› aftanfyri, og so er ein lítil útbygningur komin afturat. Munurin sæst, tá tú fert inn gjøgnum hur›ina í n‡ggja utbygninginum. Her er non-stop tónleikur, hópatals skíggjar, átøkir onkrum telduspæli, l‡sa, og ljó›i› av keylum og kúlum hongur alla tí›ina í luftini.

Talan er sjálvandi um n‡ggju bowlinghøllina, sum fyri fyrstu fer› lat dyrnar upp um vikuskifti›.

Er sjálvur bitin

Bjarni Kyster er høvu›s-ma›ur aftan fyri høllina, og sjálvur sigur hann, at hann hevur havt hetta í umbúna í eina tí›.

– Áhugan fyri hesum fekk eg, me›an eg eitt tí›-arskei› var í Danmark. Vit vóru nakrir vinmenn, sum lika sum einki høvdu at fara til. Í fótbóltinum sluppu vit ikki upp í part, og fyri at royna okkurt, gjørdu vit so at fara at bowla.

– Eg gjørdist beinan vegin bitin av hesum, og sí›ani eg kom heimaftur, hevur tankin um eina høll líka sum hingi› vi›.

– Eg havi sí›ani gjørt eitt umfatandi kanningarar-bei›i, og eftir at brúkt bæ›i tí› og pengar til hetta, fór eg so veruliga undir at fyrireika hølini, sum eg hev›i fingi› til vega.

Til stuttleika kann eg nevna, at á einari av fer›unum, var verpápi mín vi› á fer›ini. Vit fóru so út at bowla okkurt kvøldi›, og hóast hann ongan tí› hev›i roynt ta› fyrr, so gjørdist eisini hann bitin av hesum, grei›ir Bjarni frá, fyri líka sum at vísa, hvussu brei›an skara ítróttin fevnir um.

Skal ver›a ein gó› løta

At Bjarni, á›renn hann fór undir ætlanina, n‡tti nógva tí› og nógvan pening upp á fyrireiking, er so avgjørt ikki naka›, sum hann í dag angrar.

– Eg eri sannførdur um, at hetta er naka›, sum hevur loyst seg. Bæ›i ta› ar-bei›i, sum eg havi gjørt í Danmark, og ta›, sum eg havi gjørt í Føroyum. Hetta tí›, eg nú havi fingi› eitt sera gott innlit í, hvussu arbei›i› eigur at ver›a gjørt.

– Ta› er jú solei›is, at talan er um ein hampuliga d‡ran tíma, tá fari› ver›ur at bowla, og so eigur kund-in eisini at kunna krevja naka› afturfyri. Hølini skulu ver›a snøgg, og um-stø›urnar annars eiga eisini at vera í lagi. Sum dømi kann eg nevna, at vit í gjár sóu onkrar smádreingir fara út á WC at fáa sær ein guv. Eg fekk beinan vegin fatur á teimum, og seg›i, at um hetta endurtók seg, so sluppu teir ikki inn aftur. Í dag hava teir aftur veri› her, og nú skikka teir sær væl.

Undir umstø›unum annars, meinar Bjarni eisini vi›, at ta› skal vera hugna-ligt at koma í høllina. Um ikki so langa tí›, fær høllin væntandi hálvt skeinki-loyvi, men ta› er so avgjørt ikki ætlanin, at hetta skal vera eitt sta›, har fólk drekka seg sk‡tt.

– Um til dømis tú og makin fara eitt leygarkvøld oman at bowla, so kostar ta› tykkum 225 kr. Tá kann ta› so ikki vera meiningin, at onkur fullur persónur, sum stendur nærhendis, skal oy›ileggja tykkum kvøldi›. Heldur ver›ur ta› solei›is, at fólk kunnu fáa sær eina øl, me›an spælt ver›ur, ella kanska eitt glas av víni aftur vi› matinum.

Kostna›urin

Sum nevnt, so er ta› kansk hálvgum d‡rt at bowla. Órímiliga d‡rt heldur Bjarni ta› tó ikki vera, og vísir í hesum sambandi á, at kostna›urin her er lægri, enn hann er flestu sta›ni í Danmark.

Tí›irnar í vikuni eru b‡tt-ar í trígjar bólkar, har fríggja- og leygarkvøld eru tey d‡rastu. Hetta kemst sjálvandi av, at ta› er her, at ta› ivaleyst er størstur áhugi at sleppa framat.

Kostna›urin er so, alt eftir hvørja tí› talan er um, úr 130 upp í 225 kr. fyri tíman. Írokna› hesum er leiga av skóm. Skogvarnir eru samstundis einasta út-ger›, umframt kúluna, sum er ney›ug. Vakrir eru teir ikki á at líta, men eisini hetta hevur sína orsøk.

– Royndirnar alla sta›ni siga, at er talan um flottar le›urskógvar, ver›a alt ov nógvir av hesum stolnir. Lættasti mátin at sleppa undan hesum trupulleika er, um skógvarnir eru so-miki› ljótir, at eingin kundi funni› upp á at stoli› teir, sigur Bjarni smílandi.



At meta eftir uppmøtingini fyrstu tí›ina, er einki at ivast í, at høllin ver›u ein »succes«

Á telduskíggjunum sæst, hvussu gongst vi› stigasavnanini. Sk‡ggin í mi›juni er til sjónvarp, so ein gó›ur fótbóltsdystur er eingin umbergin mótvegis bowlingini

Spæli›

Sum nevnt, so kostar tímin eina ávísa upphædd, og fyri hetta fær ein so 55 minuttir á breytini.

Í stuttum kann sigast um sjálvt spæli›, at ta› ræ›ur um at koppa so nógvar keylur sum gjørligt vi› hjálp av bowlingkúluni.

Fyri hvørt spæl, hevur hvør luttakari 10 royndir, og er ta› ein sera einføld stigaskipan, sum ger av, hvussu nógv stig fáast burt-úrúr.

Hvør royndin er saman-sett av tveimum køstum. Best er sjálvandi, um tú megnar at koppa allar 10 keylurnar í einum. Eitt sonevnt »strike«. Tá fellur næsta royndin burtur, men umframt at fáa 10 stig fyri hetta kasti›, fært tú har-afturat stigini, sum tú fært tey bæ›i komandi køstini.

Fært tú allar keylurnar at koppa í tveimum køstum »spare«, fært tú 10 stig, umframt stigatali›, sum næsti stoyturin gevur. Í a›r-ar mátar ver›ur eitt stig lat-i› fyri hvørja keylu, sum koppa› ver›ur.

Bowlarunum n‡tist tó ikki at hugsa alt ov nógv um hetta. Ein telda heldur skil á øllum hesum, og har-umframt er hon so vinarlig, at hon eisini syrgir fyri, at keylurnar ver›a setta upp-aftur, solei›is at alt gerst so passaliga ómaksleyst hjá okkum ø›rum.

Ein einføld, lættskiljandi skipan, og harafturat kann nevnast, at ta› eisini er einfalt at spæla. Ta› er bert at senda kúluna avsta›, og so vóna, at sikti› er nóg gott. Stuttleikin er so av-gjørt til sta›ar, líkamiki› á hvørjum stø›i bowlarin sjálvur er. Fyri n‡byrjarar er avbjó›ingin kanska bara at raka inn í trunkan, me›-an tey meira vandu, kanska heldur hava sum mál, at fáa so nógvar strike ella spare sum gjørligt.

Líka miki› á hvørjum stø›i í›karnir eru, er eitt tó púra vist. Talan er um 55 stuttligar minuttir, sum tí-verri mugu sigast at ganga alt ov skjótt.

Einki felag – enn

Enn er so einki bowling-felag sett á stovn, men sjálvur heldur Bjarni, at hetta allar helst fer at koma.

– Hetta er jú ein ítrótt, eins og so mangt anna›, og tí fer eitt felag ivaleyst at koma fyrr ella seinni. Eisini tí at ítróttagreinin nú eisini tykist vera komin til oyggjaleikirnar. Her er tó ein trupulleiki, tí sum eg havi skilt ta›, so skulu minst tr‡ feløg ver›a í land-inum, á›renn vit kunnu melda til. Ein kann sjálv-andi hugsa sær, at feløg ver›a sett á stovn kring landi›, men ta› er so bert ta› eina sta›i›, at umstø›-urnar til venjing eru til sta›ar.

Bjarni roknar heldur ikki vi›, at ein onnur høll kemur til landi› í bræ›i. Hetta tí ta› neyvan er grundarlag fyri hesum. Sum dømi kann nevnast, at tey í Danmark rokna› vi›, at upplandi› fyri eini høll skal telja á lei› 30.000 íbúgvar, so grundarlagi› undir hesi er kanska í undirkantinum.

At høllin fer at bera seg, er Bjarni tó ikki í iva um, tí sum hann sigur.

– Rokna›i eg ikki vi› tí, so var eg als ikki farin í holt vi› hetta.



Jú – kósin sær út til at vera í lagi

Bowling er fyri øll



- Bowling er millum anna› ein sera væl egna› hjá rørslutarna›um, sigur Martin Højager
Mynd: Jens Kr. Vang

Hetta heldur ein fyrrverandi dan-marksmeistari vera t‡dningamestu orsøkina til, at lutfalsliga n‡ggja ítróttin hevur fingi› fastatøkur um allan heim

BOWLING
Jákup Mørk

Ein teirra, sum hesar fyrstu dagarnar hevur veri› at sæ› í n‡ggju bowlinghøllini er danin, Martin Højager.

Hann er fyrrverandi danskur meistari, og hevur har umframt eisini roynt seg á danska lands-li›num, so talan er um ein mann, sum veit, hvat hann tosar um.

Seinnu árini hevur Martin tó ikki veri› so øgiliga aktivur á sjálvari bowling-breytini. Orsaka› av einum knæ-ska›a, hevur hann lagt bowlingina á hyllina, men áhugan fyri ítróttini hevur hann tó ikki slept. Ísta›in starvast hann nú sum eitt slag av konsu-lenti, har hann selur sína vitan til teirra, sum fáast vi› at gera n‡ggjar høllir.

Fyri øll

Spurdur, hvussu ta› ber til, at bowling er vor›in ein somiki› væl dámd ítróttagrein, sigur hann, at orsøkirnar fyrst og fremst eru tvær.

– Tá bowlingin tók seg upp av fyrstan tí›, var› hetta fyrst og fremst rokna›, sum ein ítrótt. Høllirnar vór›u ætla›ar feløgunum, og vart tú ikki limur í hesum, slapst tú ikki upp í part.

– Handilsligi parturin vi› einum felag, er tó ikki tann stóri, og tí er bowlingin í dag broytt til eitt væl umtókt frítí›ar-ítriv. Ta› er jú munur á, hvussu stórur umsetn-ingurin er, um ta› bert ver›a seldar nakrar pylsur til ítróttafólki›, ella um talan er eina heila matstovu, vi› øllum tí, sum hartil hoyrir.

At bowlingin so er vor›in somiki› vælum-tókt, tá atgongdin gjørdist lættari, kemst sambært dananum av, at hetta er ein ítrótt fyri øll.

– Líkamiki› kyn, aldur ella førleika, so kunnu øll kappast í bowling. Vi› ta› at talan ikki er um styrkisroynd fyri kroppin, kunnu børn kappast vi› vaksin, gomul sum ung kunnu dystast, og so er hetta eisini ein frálík ítrótt hjá rørslutarna›um.

– Í Danmark er hetta til dømis ein væl umtókt ítrótt hjá fólki, sum situr í koyristóli. Til hetta hava tey eitt serligt stativ, sum kúlan ver›ur løgd í, og so er bara at stilla stativi› rætt, á›renn kúlan ver›ur send avsta›.

Gó› høll

Sum nevnt, so starvast Martin í dag sum konsu-lentur hjá n‡ggjum bow-linghøllum. Spurdur, hvat hann heldur um hesa høllina, í mun til a›rar, sum hann hevur veri› vi› til at seta ígongd, svarar hann, at henda avgjørt er millum tær bestu.

– Vanliga siga vit, at ein høll vi› tíggju breyt-um ella færri er ein lítil høll. Hetta er sætta litla høllin, sum eg havi veri› til at opna, og hendan er avgjørt millum tær bá›ar bestu. At eg ikki sigi tann besta, kemst bert av, at her hava so nógvir trup-ulleikar veri› av at fáa ney›ugu loyvini. Hev›i ta› ikki veri›, hev›i eg helst sagt, at hendan var nummar eitt.

Minnist til tí›ina

Annars letur Martin væl at hesum døgunum, sum høllin hevur havt opi›.

– Sølan hevur í øllum førum veri› sera gó›, tí belegningurin av breyt-unum hevur veri› oman-fyri 90%. Vanliga siga vit, at um 70% av tímun-um ver›a seldir, so er ta› gott.

– Kanska er talan um eitt upplop, men eg rokni tó vi›, at undirtøkan framhaldandi fer at ver›a gó›. Her er ikki so øgi-liga nógv anna› hjá ung-dóminum at takast vi›, og so tykist mær eisini, at føroyingar hava fleiri pengar um hendi enn danir.

– Til dømis er hetta tri›ja dagin á ra›, at hasar genturnar har yviri eru her, sigur hann og peikar yvireftir. – Ta› kemur nærum ikki fyri í Dan-mark, og ta› eru fleiri dømi um, at so er.

Eitt seinasta hjartasuff hevur hann tó, á›renn hann í dag setir kós aftur móti Danmark.

– Eg haldi, at tit í Før-oyum mugu læra tykkum at koma til tí›ina. Ein bowling-tími er 55 minuttir, og hann byrjar, tá bíleggingin er sett. Hava tit bílagt breytina til klokkan sjey, og koma eitt korter seinni, so hava tit bara 40 minuttir. Onk-ur hevur sagt, at hetta er ta›, sum tit rópa »føroysk tí›«, men eg haldi ta› vera spell, at tí›in solei›is ver›ur stytt, sigur fryntligi danin at enda.